# Fylgisveinaeftirlit hjálpti íslendingum



*Teir stóru trolararnir eystanfyri, eitt nú Sundaberg á myndini, hava fylgisveinaeftirlit umborð, tað hava nótabátarnir eisini og næsta verður at føroysk fiskifør undir Føroyum fáa fylgisveinaeftirlit umborð. Hetta bøtir um trygdina, men gevur eisini fiskiveiðueftirlitunum møguleika at fylgja við skipunum. (tilvildarliga vald mynd)*

Tríggir av teimum fýra norsku nótabátunum, sum mánadagin vóru tiknir í íslendskum sjógvi, vórðu avdúkaðir av fyllgisveinaeftirliti. Hetta er fyrsta árið at allir teir norsku nótabátarnir, sum royna eftir lodnu við Jan Mayen, í Grønlandi og undir Íslandi, hava fylgisveinaútgerð umborð.

Men tað var av tilvild at tríggir nótabátar vóru tiknir sama dag, skuldsettir fyri at hava givið skeivt upp.

-Tað er heilt óvanligt at taka fýra norskar nótabátar ein dag.Vit hava fyrr kanska ein nótabát hvørt summa og summi ár ongan. Fylgisveinaeftirlitið er til góða hjálp. Vit kunnu siga at fylgisveinaeftirlið stuðlaði okkum, men var ikki avgerandi, sigur eitt umborð íslendsku vaktartænastuna við vevsíðuna FIS.com

Fylgisveinaeftirlitið uppdaterar hvar skipið er statt annan hvønn tíma. Um ein nótabátur steðgar á eini leið meir enn tveir tímar, so kann hetta merkja at báturin hevur fingið fisk og er við at pumpa hann innanborða. Íslendingar kunnu fylgja við skipum í egnum sjóøki, men ikki í grønlendskum ella við Jan Mayen

-Skulu vit hava upplýsingar um norsk skip í grønlendskum sjógvi, ella við Jan Mayen, so mugu vit fáa hesar frá norska Fiskeridirektoratet og tað er upp til teir, um teir vilja lata hesar, sigur íslendska vaktartænastan.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 19 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 31 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 37 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 15 |
| New York | 25 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 993 hPa. eystan fyri Skotland fer norðureftir, og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft framvegis móti Føroyum.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum stendur mestsum í stað, so høgættin stendur við.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/07 kl. 06⁰⁰– 12/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,4°
Minsti hiti máldur í juli 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,7 mm – mált frá 11/07 kl. 06⁰⁰– 12/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 27,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

13. juli: Seinna kvarter
20. juli: Tendring - Økusól
21. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. juli | 00.49 | 13.21 | — | 12.21 | 00.04 | 12.36 | 02.49 | 15.21 | 03.49 | 16.21 | 11.36 | — | 10.36 | 23.03 | 01.04 | 13.36 | 02.04 | 14.36 | 00.34 | 13.06 | 01.49 | 14.21 |
| 14. juli | 01.48 | 14.16 | 00.48 | 13.16 | 01.03 | 13.31 | 03.48 | 16.16 | 04.48 | 17.16 | 00.03 | 12.31 | 11.31 | 23.54 | 02.03 | 14.31 | 03.03 | 15.31 | 01.33 | 14.01 | 02.48 | 15.16 |
| 15. juli | 02.39 | 15.03 | 01.39 | 14.03 | 01.54 | 14.18 | 04.39 | 17.03 | 05.39 | 18.03 | 00.54 | 13.18 | — | 12.18 | 02.54 | 15.18 | 03.54 | 16.18 | 02.24 | 14.48 | 03.39 | 16.03 |
| 16. juli | 03.25 | 15.48 | 02.25 | 14.48 | 02.40 | 15.03 | 05.25 | 17.48 | 06.25 | 18.48 | 01.40 | 14.03 | 00.40 | 13.03 | 03.40 | 16.03 | 04.40 | 17.03 | 03.10 | 15.33 | 04.25 | 16.48 |
| 17. juli | 04.11 | 16.34 | 03.11 | 15.34 | 03.26 | 15.49 | 06.11 | 18.34 | 07.11 | 19.34 | 02.26 | 14.49 | 01.26 | 13.49 | 04.26 | 16.49 | 05.26 | 17.49 | 03.56 | 16.19 | 05.11 | 17.34 |

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn